# Spæl við bil kundi endað galið

*Spælið við bil, hjá einum ungum vágadrongi, kundi kosta vinmanni hansara lívið. Hesin var tíbetur, so knappur, at tað eydnaðist honum at sleppa rímuliga óskaddur*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað er tiltikið, at ungum fólki dámar væl at spæla við bilar - stórar bilar, men tað er ikki altíð, at hetta er heilt vandaleyst.

Um vikuskiftið var tað um reppið, at slíkt spæl kostaði einum ungum manni lívið.

Tveir ungir mans, vóru farnir í bili oman til ferjuleguna á Oyrargjógv, og har stakk beistagerðin í bilføraran.

Hann spældi við bilinum runt á økinum - mól runt - og annð, og til síðst gjørdi hann av at loypa hvøkk á vinmannin við at koyra heilt nær honum.

Men ólukkutíð - hann koyrdi ov nær.

Vinmaðurin, sá, at bilurin hevði beina kós móti sær og tók til beins oman móti bíðihúsinum á Oyrargjógv.

Komin har oman var bilurin komin so nær, at ungi drongurin valdi at gera eitt hopp, og tað er ikki óhugsandi, at hoppið bjargaði lívið hansara. Bilurin skreiddi nevniliga móti honum og rendi beint á bíðihúsi. Hevði drongurin staðið á vegnum, hevði hann ligið ímillum húsið og bilin, og so hevði rættuligur stórskaði staðist av.

Ístaðin slapp hann frá óhappinum við smærri snuddum, sum hann fekk, tá hann lendi á motorlúkuni og samstundis langaði høvdið í forrútin.

Ungi bilførarin valdi sjálvur at boða løgregluni frá, og tað gjørdi hann klokkan 8.45, men hann gloymdi at siga, at hann hevði rent á vinmann sín.

Hetta kom kortini løgregluni fyri oyra og teir gjørdu tí ikki mætari enn at seta seg í samband við tann ákoyrda fyri at hoyra hvaðani snuddirnir stavaðu.

Løgreglan í Miðvági sigur við Sosialin, at tann ungi bilførarin var ávirkaður av rúsdrekka og hann kann vænta sær at hoyra nærri frá ákærumyndugleikunum innan alt ov long tíð er fráliðin.



*Sunnumorgunin var Oyrargjógv eitt spælipláss fyri ungan bilførara, sum als ikki dugdi so væl sum hann lætst*

# Tiknir við hassji uppi á sær

*Fleiri ferðsluóhapp vóru um vikuskiftið og eisini vóru tveir mans tiknir við hashi uppi á sær*

SVEINUR TRÓNDARSON

Løgreglan í Havn varð kallað út til fleiri ferðsluóhapp um vikuskiftið.

Tað fyrsta var í Hósvík fríggjakvøldið, tá ein bilur, sum var á veg norðureftir, varð árendur aftaníufrá.

Stórur materiellur skaði stóðst av óhappinum, men eingin fólkaskaði hendi.

Leygardagin hendi eitt líknandi óhapp í J. C. Svabosgøtu í Havn.

Ein bilur á veg inn móti býnum kom ov langt yvir í vinstra borð og rendi frontalt á ein bil, sum kom koyrandi út eftir.

Eins og í Hósvík var materielli skaðin rættiliga stórur, men eingin fólkaskaði hendi tíbetur, sigur Súni Vinther, støðleiðari í Havn frá.

### Hassj og innbrot

Tíðliga sunnumorgunin var ein ungur maður tikin fyri at koyra ávirkaður.

Hann varð handtikin klokkan tíggju minuttir yvir trý sunnumorgunin og hann kann vænta sær at hoyra aftur frá løgregluni um ikki so langa tíð.

Seinni sunnudagin fekk løgreglan illgrunað um at tveir mans - ein 24 ára gamal og ein 28 ára gamal - gingu og seldu hassj í Havnargøtum.

Teir vórðu tí tiknir og tá fann løgreglan 12,5 gramm av hassji uppi á teimum.

Menninir vera tí ákærdir fyri brot á lógina um euforiserandi evnir, men eftir lidna avhoyring var annar teirra leyslatin.

Hin var ikki, tí hann hevði løgreglan í Vágum illgruna til í sambandi við innbrotið í Keypsamtøkuni í Miðvági sunnumorgunin, og tískilfingu teir mannin vestur til avhoyringar.

Seint sunnukvøldið fekk løgreglan boð um omanlop við Stykki, og tí tók landsverksfrøðingurin sær av áðrenn skaði hendi.

# Innbrot í Keypsamtøkuni

*Millum 3 og 5.000 krónur vórðu stjolnar úr Keypsamtøkuni um vikuskiftið*

SVEINUR TRÓNDARSON

Sunnunáttina varð brotið inn í Keypsamtøkuna í Miðvági. Farið var inn gjøgnum ein rút í goymsluhølunum, og innkomnir høvdu tjóvarnir stjolið millum 3 og 5.000 krónur og eitt sindur av sigarettum.

Løgreglan hevði góð spor at ganga eftir, hevði illgruna um hvør maðurin var. Seinni sunnudagin var persónurin tikin í Havnargøtum í øðrum sambandi, og tá løgreglan har var liðug við hann varð hann sendur løgregluni í Vágum, sum avhoyrdi mannin í gjár.

# Møt til sýn ella rúka pláturnar

*Løgreglan er nú farin at klippa pláturnar av bilum, sum ikki møta til sýn hjá Bileftirlitinum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Løgreglan fær javnan boð um at klippa plátur av bilum. Ein orsøk er, tá bilar ikki møta til sýn hjá Bileftirlitinum.

Nú er Bileftirlitið meira javnan farið at heita á løgregluna at taka pláturnar, og í seinastu viku fekk løgreglan eina áheitan um at taka pláturnar av 14 bilum, sum ikki eru møttir til sýn.

Í tíðindastubba frá løgregluni stendur at lesa, at sjey bilar í Tórshavn, tveir í Klaksvík, ein í Vestmanna, ein í Runavík og tríggir bilar á Tvøroyri standa til at missa pláturnar ein av allarfyrstu døgunum, tá løgreglan aftur hevur hvest sær saksin.

# Friðarligt konsertvikuskifti

*Løgreglan í Runavík hevði eitt av teimum heilt friðarligu vikuskiftunum hesaferð*

SVEINUR TRÓNDARSON

– Okkurt smávegis ferðsluóhapp, annars einki, sigur vakthavandi á støðini í Runavík.

Hetta fer í søguna sum eitt av teimum friðarligu vikuskiftunum, og tað hóast Runavík sunnudagin legði høll til seinnu konsertina hjá Creamy.

– Men tað gekk upp á stás. Alt var sera væl lagt til rættis, og tað gekk, sum eftir ánni, sigur vakthavandi, sum veit hvat hann tosar um, tí høllin og støðin eru grannar.

# Føroyskur advokatur gevur út bók

*Saman við einum starvsfelaga hevur føroyski advokaturin, Jóhannus Egholm Hansen gvið út danska lærubók á Universitetsstigi*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað sigst, at føroyingar eru allastaðni og tað hendir seg meiri enn so, at teir síggjast við hvørt.

Jóhannus Egolm Hansen hevur í hvussu er gjørt eina roynd at vís, at hann er til.

Jóhannus eigur, saman við øðrum, og arbeiðir fyri advokatvirkið Dania advokater, men umframt tað undirvísir hann eisini við lærda háskúlan í Keypmannahavn í fakinum »Keyp og søla av virkjum«.

Tað er í tí eginleikanum, at hann, saman við einum starvsfelaga hevur givið út bókina »Køb og salg af virksomheder«.

Bókin er ætla sum undirvísingartilfar í lærugreinini, men kann uttan iva koma væl við hjá øðrum við.

Medhøvundur er Christian Lundgren, sum eisini starvast, sum advokatur.




Bókin er sera umfatand og er upp á knappar 400 blaðsíður. Tað er forlagið »nyt juridiskt forlag«, sum gevur bókina út.



**e-mail: jakup@sosialurin.fo**

## ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini um ítróttin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

# Kári kom aftur og sigraði

*Kári Mortensen, sum í farnu viku boðaði frá, at hann hevði tikið seg sjálvan av neistaliðnum, var kortini á vølli sunnudagin, og hann átti so sanniliga sín lut í sigrinum á føroyameistarunum av Strondum*



*Kári Mortensen var hóast alt at síggja á neistaliðnum sunnudagin, og hann átti sín stóra lut í sigrinum, sum viðførdi, at Neistin nú er ovast á stigatalvuni*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

Neistin-StÍF 24-23 (13-11)

Tað var av sonnum lagt upp til stórdyst sunnudagin, tá strandingar komu á vitjan hjá Neistanum.

Liðin bæði vóru saman við vestmenningum á odda í landskappingini, og tá VÍF ikki skal spæla fyrr enn í annakvøld, var samstundis greitt, at vinnarin av dystinum hetta kvøldið gjørdist nýtt oddalið í kappingini.

Flestu áskoðararnir mundu tískil vænta ein javnan og spennandi dyst, men fyri neistaáskoðararnar mundi tað helst kennast sum ein dyggur smeitur, at Kári Mortensen fáar dagar undan dystinum boðaði frá, at hann ikki longur var partur av liðnum.

Ósemjan, sum var orsøk til hetta stríð, varð tó fyribils løgd til síðis, so veteranurin hjá Neistanum var kortini á vøllinum, tá leikararnir hitaðu upp undan dystinum.

### Lítil munur

Tá dysturin byrjaði, var Kári kortini ikki á vøllinum. Ístaðin sat hann á beinkinum, har hann mátti hyggja at, meðan liðfelagarnir royndu at takast við mótstøðuliðið.

Fyrstu løtuna gekst hetta alt annað enn væl, og hesa løtuna sýndu strandingar nógv tað betra spælið.

Í álopspartinum sýndu teir nakað av tí spælið, sum seinasta ár tryggjaði teimum FM-heitið, og í verjupartinum vóru teir sera nærlagdir. 3-2-1 verjan syrgdi fyri, at Áki Olsen og Heini Joensen ikki sluppu ótarnaðir framat, og ikki var líkt til, at viðspælarar teirra megnaðu at lyfta spælið hjá sær sjálvum.

Hóast væl vardur, so megnaði Áki tó at gera nakað um seg, og skeyt hann trý av teimum fýra fyrstu málunum hjá Neistanum, umframt at hann fekk tillutað eitt brotskast.

Tá hinir leikararnir, sum sagt, ikki megnaðu at gera nakað serligt um seg, so lá væl fyri hjá strandingum at vinna sær eina leiðslu.

Tá eitt korter var farið av dystinum, slapp Kári Mortensen so inn á vøllin, og beinan vegin sást hetta aftur í spælinum hjá bláklædda havnarliðnum.

Samstundis varð Petur Magnusson settur at verja málið, ístaðin fyri Boga Hendriksen, og Neistin brádliga fór Neistin at vinna seg inn á strandingarnar.

Væl gekst, og tá farið varð til hálvleiks, hevði Neistin tryggjað sær eina tvey mála leiðslu. Leikliga var tó lítil og eingin munur á liðunum, og flestu áskoðararnir mundu vera samdir um, at enn var ikki á nakran hátt avgjørt, hvørt av liðunum skuldi fáa tey bæði stigini, sum dystast varð um.

### Mundu mist sigurin

Var dysturin javnur í fyrra hálvleiki, so var hann ikki minni javnur í seinna. Neistin var kanska liðið, sum byrjaði betur, men ongantíð var líkt til, at strandingar mistu vónina um, at dysturin kundi vinnast.

Miðskeiðis í hálvleikinum eydnaðist tað teimum eisini at koma fram um, men heimaliðið svaraði beinanvegin aftur, og við nøkrum málum frá Áka Mørk og Kára Mortensen, eydnaðist tað teimum aftur at vinna seg fram um mótstøðumenninar.

Móti endanum av dystinum vann Neistin sær eina trý mála leiðslu, og líkt var nú til, at sigurin var um at vera heima, men so var ikki kortini. Seinastu løtuna av dystinum megnaðu neistaleikararnir nevnliga at gera uppgávuna óneyðuga torføra, tá teir tvær ferðir framdu mistøk í álopspartinum, og tá strandingar samstundis skoraður upp á sínar møguleikar, var brádliga bert eitt mál á muni.

Seinasta strandaálopið megnaði verjan hjá Neistanum tó at halda somikið tætt, at StÍF ongantíð fekk nakrar skotmøguleikar, og at enda vórðu dømdir fyri nøl, og tískil mistu møguleikan fyri javnleikinum.

Neistarnir kundu sostatt fegnast um enn tvey stig í oddastríðnum. Tvey stig, sum bóru við sær, at liðið nú fyri fyrstu fer í árinum er á odda í fremstu mansdeildini.

### Nógv at siga

Tað vóru sjálvandi fleiri orsøkir til, at neistaliðið vann dystin sunnudagin, men tvær tær týdningarmestu av hesum vóru ivaleyst, at Petur Magnusson stóð seg sera væl í málinum, og at Kári Mortensen kortini var at síggja á vøllinum.

Yvirhøvur var talan um sera gott málmansspæl í dystinum, og bæði Petur og Johan høvdu fleiri stak góðar bjargingar, tá mótstøðuleikarar gjørdist einsamallir við teimum.

Stóra samrøðuevnið eftir dystin varð tó Kári Mortensen. Hóast hann nú er komin nakað upp í árini, og longu var at síggja í fremstu hondbóltsrøðini áðrenn fleiri av núvernadi liðfeløgunum høvdu sæð dagsins ljós, so er einki at ivast í, at hann hevur alstóran týdning fyri spælið hjá Neistanum.

At týdningur hansara var so stórur, mundu fægstu viðhaldsfólkini tó gruna, tí sunnudagin var sjón fyri søgn, at tað er stórur munur á at síggja neistaliðið spæla við og uttan superveteranin.

### Einki er avgjørt

Hóast fagnaðurin í neistarúminum helst var stórur eftir dystin, so er einki at taka seg aftur í, at enn er langt eftir á mál í FM-stríðnum. Tvey stig eru nú á muni niður til næstu liðini á stigatalvuni, men enn eru dystir bæði á Skála og Vestmanna eftir á skránni, umframt at grannarnir úr Kyndli helst hava ætlanir um eina endurtøku av steypasigrinum, tá grannauppgerð verður um eina góða viku.

Strandingarnir munnu helst iðra seg um mistu stigini, men møguliga kunnu teir troysta seg við, at teir í løtuni liggja nógv betri fyri í kappingini, enn teir gjørdu um sama mundi seinasta kappingarár.

Ta ferðina taptu teir eisini fyrra dystin í endaspælinum móti Neistanum, men megnaðu kortini at reisa seg og at enda vinna FM-heitið. Um hetta eisini fer at eydnast teimum í ár, er ilt at siga, men í øllum er eitt vist, og tað er, at enn er einki avgjørt í FM-stríðnum.

### Dysturin í tølum:

**Málskjúttar:**
Neistin: Kári Mortensen 7, Áki Olsen 6, Heini Joensen 5 (1), Áki Mørk 5, Jákup Sverri Kass 1
StÍF: Sveinbjørn Poulsen 5, Marius Joensen 5, Jónleif Sólsker 4, John Petersen 4, Alexandur Johansen 2, Artur Johansen 2, Karstin Danielsen 1
**Brotskøst:**
Neistin 2
**Útvísingar:**
Neistin 5, StÍF 7
**Dómarar úr Kyndli:**
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

# Ikki við og tó

*Hóast vit leygardagin skrivaðu tað øvugta, so var Kári Mortensen at síggja á neistaliðnum sunnudagin*

JÁKUP MØRK



Síðani 1. oktober 1998 hevur Neistin skipað seg soleiðis, at ein bólkur hevur havt ábyrgdina og tikið avgerðir um fyrsta mannslið. Kristian á Neystabø er formaður í hesum bólki, sum hevur høvuðsábyrgdina av fyrsta mansliðinum hjá Neistanum.

Sum skilst hevur hesin bólkur undan vikuskiftinum sagt við nevndina í Neistanum, at tað ikki kundi góðtakast, at viðurskifti, sum einki høvdu við fyrsta manslið at gera, vórðu brúkt ímóti fyrsta mansliðnum.

Í seinastu viku vildi Kristian á Neystabø ikki gera viðmerkingar til tað konkreta málið, og tað vil hann framvegis ikki. Men sum skilst á honum, eru innanhýsis felagsviðurskiftini um at koma í rættlag.